

# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*

Nr. 182 - 24. september 2005


Bókatips:

## Okkurt sum líkist

Summar bøkur ella høvundar fáa okkum at ynskja, at bókin vit júst hava lisið, var væl longri. Ella at vit høvdu eina afturat, sum tók tráðin upp, har hin slepti. Á slóðini "Noget der ligner" á www.litteratursiden.dk hava tey funnið uppá ráð. Har kanst tú velja millum eina ørgynnu av høvundum og bókum og harfrá fáa viðmæli og uppskot um aðrar bøkur og høvundar, sum á onkran hátt líkjast.

Er tað okkurt ávíst bókmentaslag, sum hevur tín áhuga, kanst tú eisini fáa slóðir og hugskot til at kunna teg um bæði tað søguliga og tað nýggjasta innan júst tað økið. Í nógvum førum finnur tú eisini kritiskar greinar, sum fara í dýpdina við hesum bókmentasløgunum bæði í skaldsligum og samfelagsligum høpi.

## Bókabrot til sølu

Permur og umrøður eru ikki altíð tað, tær síggja út til at vera. Vilt tú tryggja tær, at bókin tú ætlar at keypa, livir upp til tíni krøv, er nú møguleiki at keypa eitt brot úr henni fyrst. Við nýggju tænastuni "Amazon Shorts" bjóðar stóri nethandilin www.amazon.com lesarum at keypa kapitlar, brot ella einstakar síður úr ávísum bókum fyri 49 cent pr. stk, sum síðani verða sendar við telduposti.

Sambært Amazon vónar fyritøkan við hesum at geva ókendum høvundum ein betri kjans í høðru kappingini um lesararnar.

# Írskir dreymar

Bókasíðan hevur latið sær fortalt, at írskir høvundar leingi hava verið millum teir best umtóktu hjá føroyskum bókasavnsbrúkarum. Vit hava forvitnast og kaga afturum permuna á nøkrum av toppskorarnum

*Ingrid Bjarnastein/Anna V. Ellingsgaard*

Frank McCourt, *Angela's Ashes*
og 'Tis: A Memoir
Týtt Jan Bredsdorff, *Angelas Aske*, 1996; *Lykkens Land*, 2000



*Frank McCourt9*

*Angelas Ashes* er vorðin ein av størstu, altjóða bestseljarunum, síðani hon kom út miðskeiðis í 90unum. Harafturat hevur bókin eisini fingið framúr ummæli frá ummælarum kring allan knøttin.

Talan er um eina lýsing av barndóminum hjá írska høvundanum, Frank McCourt, sum varð føddur í Brooklyn í 1930. Um trongu korini, hann og systkin hansara vuksu upp undir, og um hvussu tey hvønn dag noyddust at stríðast fyri at fáa nóg mikið av mati og peningi til dagin og vegin.




Fyrstu fýra árini av lívinum búði McCourt saman við familjuni í USA, men familjan flutti síðani aftur til Írlands. Og at flyta aftur til Írlands mitt í 30unum við einum norðurírskum pápa varð ikki væl móttikið. Hvørki av familju ella hinum í býnum Limerick, har McCourt-børnini vaksa upp.

Endurminningarnar eru ein blanding av fátækradømi, drykkjuskapi og deyða, sum írska familjan stríðist við. Men alt hetta uttan at gerast ov nógv av tí góða. Frank McCourt hevur nevniliga ein heilt serligan eginleika. Og tað er at gera bókina skemtiliga. Mitt í svárastu neyð og sorg dettur ein lítil setningur inn í millum, sum ger, at ikki ber til at lata vera við at smílast. Harumframt hevur bókin nakrar framúr persónslýsingar, sum gera hann uppaftur meira livandi og nærverandi.

*'Tis: A Memoir* byrjar har *Angela's Ashes* slepti, og tey, sum bíðaðu eftir framhaldinum, verða ikki vónbrotin. Við sínum vánaligu tonnum og áhaldandi bruna í eygunum er Frank komin aftur til Amerika, landið, har øll eru vøkur og hava hvítar tenn. Men bókin verður ikki søgan um avísdrongin, sum gjørdist millióningur. Í fyrru helvt fylgja vit Frank inn og út úr vertshúsum, størvum og hjúnalagnum í einum lívi, sum meir og meir minnir um ræðuliga pápan, sum pestaði bæði Frank og allari familjuni lívið. Sjálvt um Frank giftir seg inn í eitt skúladømi um tann amerikanska dreymin, verður hann verandi ein tilflytari. Ringa samvitskan um ikki at halda seg til "sítt egna slag" nívir, meðan Frank roynir at koma til sættis við sín tvíbýtta írsk-amerikanska samleika. Ikki fyrr enn Frank gerst lærari og seinni so smátt byrjar at skriva, byrja vit at hóma okkurt slag av sálarfriði hjá ørkymlaða unga íranum.

Meðan endurminningarnar hjá Frank McCourt higartil hava verið ein hugtakandi men náðileys persónlig frásøgn, byrja bøkurnar í seinnu helvt av *'Tis* at líkjast eini skaldsligari heild. Heitið 'Tis (stytting av "it is") er svarið hjá Frank uppá seinasta spurningin í *Angela's Ashes*, har ein sjómaður spyr, um Amerika í grundini ikki er eitt frálíkt land. Seinna bókin verður sostatt ein góðtøka av lagnuni, og ein máti at seta punktum, tá bókin endar við, at øskan av mammuni Angela verður stroydd á einum kirkjugarði í Limerick. Men samstundis, sum prentaða útgávan av lívinum hjá Frank McCourt endar her, byrjar ein nýggjur partur. Við *Angela's Ashes* og *'Tis* situr lesarin nú við uppfylta dreyminum hjá Frank McCourt í hondini - dreyminum um at gerast ein víðagitin rithøvundur. Ta søguna hava lesarar framvegis til góðar.




## Kjak um *Kodakmyndir frá sjeytiárunum*

Frá Fuglafjarðar Bókasavni frætta vit, at lesiringurin byrjar aftur mánakvøldið 3. okt. Kl. 20. Tað er bókasavnið sjálvt, sum skipar fyri lesiringinum, sum heldur til í hugnaligu hølunum hjá Fuglafjarðar Bókasavni. Ein bók verður lisin um mánaðan. Síðani verður kjakast um hesa bók næstu ferð, lesiringurin hittist. Øll áhugaði kunnu vera við.

Hesuferð leggur lesiringurin fyri við at lesa yrkingasavnið *Kodakmyndir frá sjeytiárunum* eftir Kim Simonsen, sum nýliga er útkomið. Um tú ikki longu eigur bókina, ber til at fáa hana á bókasavninum. Bókasavnið hevur opið hvønn dag millum 9-17 og leygardag millum 9-12.

Einasta fortreyt at luttaka í lesiringinum er áhugi. Nýggir luttakarar eru vælkomnir. Ring og melda teg til á Tlf. 44 47 45 ella 22 72 42 ella støkk inná gólvið!

Sagt um *Kodakmyndir frá sjeytiárunum:*

*„ ... flestu yrkingarnar eru undursama góðar."*
Agnar Jógvansson

*„ ... ópoetiskar, órytmiskar yrkingar fullar av stavivillum."*
Oddfríður M. Rasmussen

*„ ... savnið er ein moderna útgáva av føroyskum útisetaskaldskapi … ein roynd at víðka ein trongan heim."*
Bergur Rønne Moberg


**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**

Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent

FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo